## Røkke onga neyð



Norski ríkmaðurin Kjell Inge Røkke og kona hansara, Anne Grete, fara ikki at líða nakra fíggjarliga neyð fyribils. Norsk bløð skriva, at tey bæði fáa meiri enn 440 milliónir norskar krónur frá íleggingarfelagnumThe Resource Group. Tað verður gjørt við at niðurskriva eginpeningin í felagnum, og tað ger, at Røkke-hjúnini sleppa undan at rinda skatt av pengunum, skrivar Aftenposten. Kjell Inge Røkke eigur 98 prosent av partapeninginum í The Resource Group, og konan eigur tey bæði seinastu prosentini, sum hann gav henni á jólum í 2007. Tað gongur væl hjá felagnum. Roknskapurin fyri 2008 vísir, at tað hevði 327 milliónir norskar krónur í avlopi í fjør.

## Nógvir gjaldssteðgir í Íslandi

Fíggjarkreppan í Íslandi setir framvegis síni týðiligu spor, hóast hagtølini ikki altíð eru verri enn í fjør. Í gjár bleiv kunngjørt, at 66 íslendskar fyritøkur fóru í gjaldssteðg í mai mánaði, og hóast tað ljóðar ógvusligt, var talið minni enn í mai í fjør, tá 74 fyritøkur fingu somu lagnu. Eitt týðiligt tekin um kreppuna er, at triðja hvørt felag, sum fór í gjaldssteðg í síðsta mánaði, var úr byggivinnuni. Hagtølini fyri fimm teir fyrstu mánaðirnar vísa, at árið í ár hevur verið verri enn 2008. Til 31. mai í ár fóru 413 feløg í gjaldssteðg, og tað var væl meiri enn somu mánaðir í fjør, tá ntalið var 301, skrivar morgunblaðið. Vøksturin svarar til 37 prosent.

Altjóða leitistjórin hjá Statoil:

# Vit bora aftur í Føroy

**-Vit hava framvegis góðar vónir um at finna kolvetni í føroysku undirgrundini. Og tað er orsøkin til, at vit nú eru farnir at fyrireika í minsta lagi ein leitibrunn aftrat á landgrunninum. Hetta boðaði ovasti stjórin fyri allari leiting hjá StatoilHydro kring heimin, Tim Dodson, Johan Dahl, oljumálaráðharra frá á fundi í London herfyri.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Johan Dahl, oljumálaráðharri her saman við umboðum fyri StatoilHydro í London. Tim Dodson vistumegin Johan Dahl og Rúni M. Hansen høgrumegin. Hinir báðir eru fra*

Navn hansara er Tim Dodson. Hann er ikki amerikanari soleiðis sum vælklingandi navnið kundi bent á. Men hann er virkin í oljuvinnuni, altjóða oljuvinnuni. Og hann er norðmaður. Tim Dodson er ikki ein og hvør í altjóða oljuvinnuni. Hann stendur á odda fyri allari oljuleiting hjá norska oljurisanum StatoilHydro kring heimin herundir eisini leitingini við Føroyar. Undir honum arbeiðir m.a. føroyski oljustjórin Rúni M. Hansen úr Fuglafirði. Herfyri hittust teir báðir, Tim Dodson og Rúni Hansen í London saman við ongum minni enn føroyska oljumálaráðharranum Johan Dahl, sum var á almennari vitjan í bretska høvuðsstaðnum eitt nú fyri at kunna seg um framtíðar ætlanir í økinum millum Hetland og Føroyar.

Sosialurin fekk orð á Tim Dodson eftir fundin við Johan Dahl. Hann sigur, at teir kunnaðu landsstýrismannin um virksemi hjá StatoilHydro kring heimin, her eisini Føroyar. –Vit eru sera fegnir um at hava fingið so mong leitiloyvi og ikki minst tað seinasta frá 3. útbjóðing, nr. 16, har vit nú fara at skjóta seismikk. Vit hava framvegis vónir um at finna olju og gass við Føroyar.

### Satsa uppá Føroyar

- Nú hevur eitt stórt oljufelag sum BP gjørt av at taka seg úr Føroyaøkinum. Hvussu ber tað til, at eitt felag sum StatoilHydro kortini velur at brúka nógvar pengar her?

- Nú er munur á, hvar oljufeløgini velja at gera íløgur. Tað finnast fleiri váðilig og nýggj leitiøki kring heimin, og her mást tú so velja tað ella tey burtur úr, har tú metir bestu møguleikar vera at finna olju og gass. Og her hava vit hjá StatoilHydro valt at satsa uppá Føroyaøkið sum eitt av teimum meira váðiligu økjunum, tí vit trúgva uppá, at her finst kolvetni í undirgrundini. Og at møguleikar eru at gera stór fund.

- Hvussu leingi kunnu tit vera her uttan at hava gjørt nakað rakstrarverdugt fund?

- Vit hava skotið nógvan seismikk og hava nakað herfyri borað ein brunn, har vit ikki hava testað tað økið, ið vit fóru eftir, so her er enn nakað arbeiði at gera. Vit miðja móti at bora í minsta lagi ein brunn aftrat fyri finna út av, um hesir strukturnarnir, sum vit hava lagt okkum eftir at kanna, goyma kolvetni.

Tim Dodson sigur, at teir hava ikki enn gjørt av nær og hvar teir fara at bora tann komandi brunnin á føroyska landgrunninum, men teir hava kunnað landsstýrismannin um, at teir ætla at bora ein brunn í næstu framtíð. Um tað verður í 2010 ella 2011 ynskir Statoilstjórin ikki at gera viðmerkingar til. –Vit vilja sjálvandi útvega okkum so nógvan seismikk sum tilber fyri harvið at finna júst tað besta staðið at seta borin í.

Altjóða leitistjórin hjá StatoilHydro dylur ikki fyri, at teir meta alt økið millum Føroyar og Hetland